# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Hesa ferð gjørdist talan um 9-0 sigur í Vági, har heimaliðið ikki fekk gjørt stórvegis við yvirmaktina úr Klaksvík*

# Gyltar KÍ-kvinnur

**Níggjunda meistaraheitið á rað kom til høldar, tá KÍ-kvinnurnar um vikuskiftið vunnu stórsigur í Vági**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um góða føðingardagsgávu, sum KÍ-kvinnurnar høvdu við sær norður til Klaksvíkar sunnudagin.

KÍ fylti tá 104 ár, og eins og tær hava gjørt tað á hvørjum ári, síðani árstalið byrjaði við tvey-talinum, hava kvinnurnar hjá KÍ aftur í ár vissað sær FM-heitið.

Og so kann leggjast afturat, at talan í ár var um gull, ið kom mest sum leikandi lætt til høldar. Hóast nøkur av hinum liðunum hava havt nøkur góð avrik, so hava tey alt í alt verið alt ov óstøðug til veruliga at hótta KÍ, sum enn hevur fult stigatal, og sum altso tryggjaði sær gullið fýra umfør fyri kappingarlok.

## Sigldu kapp

**Tann 24. august varð skipað fyri kappsigling á Skálafjørðinum. Úrslitið av kappingini gjørdist hetta:**

| NR | Bátur | Eigari |
|---|---|---|
| 1 | Jomfrúgvin | Símun Olsen, Vestmanna |
| 2 | Hoyvíksbáturin | Egil/Johan Simonsen |
| 3 | Oddvør | Dagfinn Joensen, Kollafjørð |
| 4 | Jona | Per Mikkelsen, Strendur |
| 5 | Malli | Odmar Joensen, Kollafjørð |
| 6 | Stubbin | Kári Hansen, Kvívík |
| 7 | Kollsteinur | Mikkjal Hansen, Hósvík |
| 8 | Niels í Nesinum | Alfred Gullbein, Tórshavn |
| 9 | Keisarin | Martin Dam, Kalbak |
| 10 | Ternan | Kári Borgarklett, Hósvík |
| 11 | Falkurin | Kári í Garði, Strendur |
| 12 | Luddi | Jógvan Henriksen, Kollafjørð |
| 13 | Drøvn | Knút Bjørk, Argir |
| 14 | Eyð | Atli Leitisstein, Runavík |

# Íslendska stjórnin setir »prís« uppá OL-silvurið

**Ìslendska ríkisstjórnin letur 50 miljónir íslendskar krónur til íslendska hondbóltssambandið**

OL

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Íslendska ríkisstjórnin hevur samtykt at lata íslendska hondbóltssambandinum, HSÍ eina játtan, sum ljóðar uppá 50 miljónir íslendskar krónur. Í okkara peningi er talan um uml. 3 miljónir krónur. Einar Torvarðarson frá HSÍ sigur við Dagblaðið Vísir, at tað hevur sera stóran týdning fyri HSÍ, tí tey hava nógvar útreiðslur av minniligu ferðini hjá íslendska manslandsliðnum í hondbólti.

- Við játtanini frá íslendsku ríkisstjórnini fara tey í HSÍ at megna at fáa endarnar at røkka saman, sigur hann.




*50 milliónir íslendskar krónur fekk íslendska Hondbóltssambandið sum takk frá stjórnini fyri framúr avrikið í Beijing*

Einar Torvarðarson sær eisini uppá játtanina, sum eina viðurkenning fyri tað góða arbeiðið, sum HSÍ hevur staðið fyri gjøgnum árini. Hann heldur, at peningurin fer eisini at hjálpa HSÍ at halda gongd í yngru landsliðunum. Haraftrat fær HSÌ eisini meir enn 20 miljónir íslendskar krónur frá eini landsumfatandi innsavnan. So íslendski almenningurin setur eisini prís uppá tað bragdið, sum Óli Stef, Fusi og hinir landsliðspælarnir hava framt í Beijing.